FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

**Til hoyringspartarnar**

Argir, tann 7. juli 2010

**Kunning um hoyring um pensjónsnýskipanina:**

Ein politiskur fylgibólkur hevur síðan august 2009 arbeitt við pensjónsnýskipanini. Fylgibólkurin hevur gjørt uppskot til semju um broytingar av embætismannauppskotinum frá juni 2009 og um at taka ávís onnur viðurskifti við í arbeiðið. Í skrivinum "*Pensjónsnýskipan 2010. Uppskot til semju*" verður greitt stutt frá um tær broytingar, sum tann politiski fylgibólkurin er samdur um. Uppskotið til semju er hjálagt hesum skrivi.

Uppskot til lógarbroytingar, sum eru neyðugar fyri at gera pensjónsnýskipanina til veruleika verða nú løgd fram til almenna hoyring.

Fyri at fremja pensjónsnýskipanina, skulu hesar lógir gerast ella broytast:

Frá Fíggjarmálaráðnum:

- Uppskot til Lóg um javning av fólkapensjón
- Uppskot til Lóg um broyting av ásetingarlógini
- Uppskot til Lóg um broyting av lóg um samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin
- Uppskot til Lóg um eftirlønaruppsparing
- Uppskot til Lóg um pensjónsskatt

Frá Almannamálaráðnum:

- Uppskot til lóg um uppihald á stovni o.l.
- Uppskot til lóg um áseting og javning av almannaveitingum
- Uppskot til lóg um almannapensjónir o.a.
- Uppskot til lóg um viðbót til ávísar pensjónistar v. fl.
- Uppskot til "lovbekendtgørelse om offentlig forsorg"

Øll uppskotini verða send út til hoyringar í summar. Eftir ætlanini kemur parturin um almanna-pensjónir í viku 26, og parturin um eftirlønaruppsparing í viku 28. Hoyringssvar fyri øll uppskot viðv. pensjónsnýskipanini skulu vera Fíggjarmálaráðnum og Almannamálaráðnum í hendi í seinasti lagi 20. august 2010.

Spurningar og ivamál kunnu setast Fíggjarmálaráðnum á telefon 35 20 20 ella teldupost fmr@fmr.fo.

Vinarliga

**Jóannes Eidesgaard**
landsstýrismaður

KVÍGGJARTÚN 1 • POSTSMOGA 2039 • FO-165 ARGIR
TELEFON: + 298 35 20 20 • TELEFAX: + 298 35 20 25 • E-MAIL: FMR@FMR.FO